Polterabend endar í rættinum

Ein ógvusligur polterabend í Vordingborg enda›i vi›, at brú›gómurin breyt beini› og mátti fara haltandi vi› høkjum til altars dagin eftir. Nú krevur ma›urin endurgjald frá teimum, sum skipa›u fyri hesum polterabend.

Ta› er fyrstu fer› í danskari rættarsøgu, at eitt mál um stuttleika og ábyrgd í sambandi vi› ein polterabend kemur fyri í rættinum.

Seks starvsfelagar og stjórin hjá unga manninum skipa›u fyri stuttleikakvøldinum dagin fyri, at hann skuldi giftast. Eitt av tiltøkunum hetta kvøldi› var, at teir ætla›u at draga brú›gómin upp í ein krana, men ta› vildi hann ikki og setti føtur í spenni. Endin var, at me›an teir sjey menninir royndu at noy›a brú›gómin upp í kranan, breyt hann beini›.

Nú krevur ma›urin, sum forrestin var› giftur í øllum gó›um, endurgjald fyri pínu, mista inntøku og møguligt varandi mein av tilbur›inum.

Dómur væntast í málinum um jóltí›ir.

ek

Sey›as‡ning í Haraldsundi

Haraldsund: Bygdafeløgini Ljósi› og Vesturskin í Kunoynni skipa aftur í ár fyri sey›as‡ning.

S‡ningin, sum ver›ur í sey›ahúsinum fyri sunnan í Haraldsundi, ver›ur hildin leygardagin 11. november og byrjar klokkan 10.00.

Um kvøldi› ver›ur døgur›i í bygdahúsinum í Haraldsundi fyri fjallmonnum í Kunoy og hagast‡rinum í oynni.

Fríggjakvøldi› fyri ver›ur skipa› fyri hugnakvøldi í bygdarhúsinum í Kunoy og skránni er millum anna› burturluting og undirhald.

Litprent í Listaskálanum

Lagdar eru fram grafiskar myndir eftir føroysk listafólk. Hvørt ár fáa listafólk møguleika at n‡ta verksta›in í Listaskálnum og ver›a úrslitini fyrst og fremst bo›in limum Listafelagsins

LIST
Dagfinn Olsen

Leitar ein sær í Listaskálan í Havn, so kemur ein í forhøllini fram at einum longum bor›i. Har liggja n‡ggj grafisk verk eftir nøkur av fremstu listafólkum í Føroyum í løtuni.

Vanligt er, at nøkur myndlistafólk árliga sleppa at n‡ta grafiska verksta›in, i› kn‡ttur er at Listaskálanum. Úrsliti› av av hesum ver›ur so fyrst og fremst selt limum Listafelagsins.

Umbo›a› á langa bor›inum í forhøllini eru t.d. Olivur vi› Neyst, Anker Mortensen, Bár›ur Jákupsson og Rannvá Konoy.

Zacharias Heinesen hevur eisini veri› umbo›a›ur, men verk hansara eru nú útseld.

Verkini kosta eini 300 krónur. Vanliga eru prísurin á slíkum verkum eini 1200 krónur.

Nøkur av kendastu listafólkunum í Føroyum hava veri› í grafiska verksta›num í Listaskálnum. (Mynd: Dagfinn Olsen)

Brimil: Eingin loysn í eygsjón

– Ta› kemur slett ikki uppá tal at ganga krøvunum á møti, sigur Karsten Hansen, fíggjarmálará›harri

Ta› er framvegis ongin loysn í eygsjón í trætuni ímillum Fíggjarmálast‡ri› ø›rumegin og Skipara- og Navigatørfelagi› hinumegin um lønina hjá yvirmonnunum, sum skulu sigla vi› n‡ggja vaktarskipinum Brimli.

Ta› einasta, sum bæ›i Karsten Hansen, fíggjarmálará›harri, og Ellintur Abrahamsen, forma›ur í Skipara- og navigatørfelagnum, eru hjartans samdir um, er, at ta› stendur í botni og at ongin loysn er í eygsjón.

Krevja hægri løn

Sum kunnugt er ta› lønin hjá teimum, sum skulu sigla vi› Brimli, sum ósemjan ímillum Fíggjarmálast‡ri› og manningarfeløgini sn‡r seg um.

Í sáttmálunum ímillum manningarfeløgini og Fíggjarmálast‡ri› um teir, sum sigla vi› Vaktar- og Bjargingartænastuni, stendur, at kemur n‡tt skip í flotan, skal ta› samrá›ast um, hvørja løn, manningin skal hava.

Men hesar samrá›ingar hava ikki ført til naka› og nú er stø›an fullkomiliga fastlæst, og tá i› Sosialurin fór til prentingar í gjár var ta› onki, sum bendi á, at nøkur loysn var í eygsjón, tí onki samband er ímillum partarnar.

Ta› er serliga ímillum Skipara- og Navigatørfelagi› og Maskinmeistarafelag ø›rumegin og Fíggjarmálast‡rinum hinumegin, at ósemjan er stór.

Starvsmannafelagi›, sum hevur dekkararnar undir sær, er eisini í samrá›ingum vi› fíggjarmálast‡ri›.

– Vit eru ikki samd, men tær samrá›ingarnar ganga sína gongd. Og eg vænti ikki, at vit fara at enda í eini so vónleysari stø›u vi› Starvsmannafelagnum, sum vit eru enda› í vi› Skipara- og Navigatørfelagnum og Maskinmeistarafelagnum, sigur Karsten Hansen.

Slett ikki uppá tal

Hinvegin heldur Karsten Hansen, at lønarkrøvini frá navigatørunum og maskinmeistarunum eru so ógvuslig, at ta› ber ikki til.

– Talan er um lønarkrøv uppá 30-40% og ta› kemur slett ikki uppá tal.Tey ver›a ikki so frægt sum tikin til vi›ger›ar, sigur Karsten Hansen.

– At gingi› slíkum krøvum á møti hev›i veri› ein áheitan til feløgini á arbei›smarkna›in um at seta lønarkrøv fram í úrtí›, tá í tey halda seg hava fingi› ov líti› í teimum vanligu sáttmálasamrá›ingunum, og ta› ber ikki til.

– Ta›, sum hetta sn‡r seg um, er, at feløgini vilja brúka Brimil sum jarnbrot fyri at fáa eina munandi lønarhækking, eisini hjá teimum, sum sigla vi› Tjaldrinum. Vit hava fingi› at vita, at feløgini krevja, at teir, sum sigla vi› Tjaldrinum skulu fáa somu løn sum teir vi› Brimli, og slík mannagongd kann ikki gó›takast.

Enn er púra óvist, nær Brimil sleppur til Føroya. Ta› stendur í sjólógini, at ta› er rei›arin, sum skal syrgja fyri, at sáttmáli er vi› manningina og fyrrenn hann er gjørdur, er ta› ólógligt at loysa. Í løtuni er onki at halda fund um, sigur Karsten Hansen. Hendan myndin er av tí sera vælútgjørdu brúnni á n‡ggja vaktarskipinum, ta› eru norskir yvirmenn, sum standa vi› ró›ri›.

Hinvegin sigur Ellintur Abrahamsen, at ta› er so lítil munur á lønunum hjá yvirmonnunum og hjá dekkarunum, at ta› er ney›ugt at fáa vi›urskiftini í rættlag.

– Í 1977 var skiparalønin runt rokna› yvir 50% hægri enn hjá einum dekkara. Í dag er hesin munur minka›ur ni›ur í nøkur og 20% og ta› er alt ov líti›. Nú eru vit komin í ta stø›u, at yvirmenninir á Vaktar- og Bjargingartænastuni fáa ta› sama í bruttoløn, sum yvirmenn uttanlands, sum vit kunnu samanbera okkum vi›, hava eftir í løn, tá i› skatturin er goldin, og ta› ver›ur als ikki gó›tiki›.

Karsten Hansen vi›gongur, at lønin hjá yvirmonnunum er ikki gó›.

– Men ta› er ikki eitt mál sum skal loysast nú. Ta› skal loysast undir vanligum sáttmálasamrá›ingum.

Hann ásannar, at Brimil er størri, krevur meiri manning, er betri útgjørdur og hevur størri maskinu enn Tjaldri›, so fíggjarmálast‡ri› er sinna› at geva teimum ískoyti fyri ta›. Hvussu gott tilbo›i› er, vil hann ikki siga. Ellintur Abrahamsen sigur, at tilbo›i› frá Fíggjarmálast‡rinum kann slett ikki gó›takast.

Enn er ongin fundur avtala›ur ímillum fíggjarmálast‡ri› og feløgini.

Ellintur Abrahamsen vísir á, at ta› stendur í sjólógini, at ta› er rei›arin, sum skal syrgja fyri, at skrivlig avtala er vi› teir, sum skulu manna eitt skip.

– Tí er ta› Fíggjarmálast‡ri›, sum skal kalla saman til fundar. Men Karsten Hansen sigur, at enn er onki at halda fund um.

Máli› kann loysast

Tórbjørn Jakobsen, landsst‡risma›ur, heldur ikki, at ta› ver›ur torført at finna eina loysn á málinum vi› styttu lestrartí›ini á studentaskúlum og HF-skei›um. Næmingar mótmæltu hesum t‡sdagin, og lærarar stu›la næmingum í kravinum um longri lestrartí›

LESIFRÍTÍ›
Stefan í Skorini

Í gjár handa›u næmingar á studentaskúlunum og HF-skei›unum kring landi› landsst‡rismanninum í undirvísingarmálum eitt mótmælisskriv. Savna›ar vór›u 700 undirskriftir til skrivi›. Sí›ani var› skipa› fyri mótmælisgongu frá skúlanum í Hoydølum ni›an í Undirvísingar- og mentamálast‡ri›, har næmingarnir handa›u Torbirni Jakobsen undirskriftirnar. 400 næmingar vóru vi› í mótmælisgonguni.

Í skrivinum stó›, at “undirrita›u næmingar í Mi›námsskúlunum mótmæla har›liga, at lesifrítí›in er stytt ni›ur í so at siga einki”.

Víst ver›ur á, at í seinasta skúlaári var sí›sti skúladagur hjá bæ›i studentum og HF-arum 28. apríl. Hetta skúlaári› er seinasti skúladagur hjá HF-arum 30. mai, og fyrsti prúvtøkudagur er 1. juni. Hjá studentunum endar undirvísingin 8. juni, og fyrstu prúvtøkudagur ver›ur 11. juni.

Eingin broyting er í skrivligu prúvtøkunum, i› vera sum í fjør. Munurin frá í fjør er tann, at nú skulu næmingarnir aftur í skúla í tíggju dagar eftir ta skrivligu prúvtøkuna. Í fjør var› ikki fari› í skúla eftir skrivligu royndirnar. Ta› eru hesir tíggju dagarnir, sum strí› nú er um.

Sinna›ir at finna eina loysn

Tórbjørn Jakobsen, landsst‡risma›ur, sigur seg avgjørt vera sinna›an at finna eina loysn, sum allir partar kunnu gó›taka.

- Ta› sn‡r seg um tí›ina millum ta skrivligu og ta munnligu prúvtøkuna, har næmingarnir skulu í skúla aftur í tíggju dagar, men lesití›in er stytt líka nógv, sum frálærutí›in er longd, sigur Tórbjørn Jakobsen.

- Orsøkin til hetta er, at ta› hevur veri› ein tendensur í londunum kring okkum at skipa ta› solei›is. Ta› er eisini gjørt her, tí ta› ver›ur hildi›, at ta› gagnar næmingunum at fáa tíggju dagar í frálæru afturat.

Hesum eru næmingarnir og lærararnir tó ikki samdir í, tí teirra vilji er, at hesir tíggju dagarnir ver›a settir av til lestrarfrí hjá næmingunum, so teir kunnu fyrireika seg til prúvtøkurnar, sum standa fyri framman.

Tórbjørn Jakobsen vísir á, at me›an næmingarnir vilja hava fleiri dagar at lesa í, hjá lærarunum sn‡r ta› seg hjá lærarunum kanska líka nógv um at hava frí í tíggju dagar vi› løn.

- Sum eg síggi máli›, so er ta› serliga ein trupulleiki hjá HF-arum, sum skulu upp í so nógvum lærugreinum í so stutta tí›, men hjá studentunum skuldi ta› bori› til at lagt hetta til rættis, tí teir hava tríggjar vikur til tríggjar prúvtøkur, og ta› er ein um vikuna, sigur Tórbjørn Jakobsen.

- Nú mugu vit loysa henda trupulleikan saman. Vit halda, at ta› skulu vera tíggju dagar vi› undirvísing, me›an næmingar og lærarar halda, at eingin skal vera. Vit eru sinna›ir at gera naka› vi› trupulleikan. Ta› er møguligt, at ta› er ov nógv at taka allar tíggju dagarnar í einum.

Tórbjørn sigur at enda, at hann dugir væl at síggja trupulleikan hjá næmingum, sum fáa frí fríggjadag og skulu upp í eini stórari lærugrein mánadag.

Lærararnir stu›la

Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara sigur í tí›indaskrivi, at teir “stu›la fult út mi›námsskúlanæmingunum í kravi teirra um longri fyrireikingartí› til munnligur prúvtøkurnar”.

Víst ver›ur á, at felagi› hevur sent undirvísingar- og mentamálast‡rinum skriv stutt eftir summarfrí›ina, har mótmælt var› tí›arætlanini fyri hetta skúlaári›.

Sagt ver›ur í skrivinum, at “munnliga prúvtøkuætlanin, i› Undirvísingar- og mentamálast‡ri› hevur lagt til rættis, er álvarsligt brot á galdandi si›venju, tekur grundarlagi› undan seriøsari prúvtøku og er í strí› vi› studentaskúla og HF prúvtøkukunnger›irnar.

Kravi› hjá lærarunum er, at “vent ver›ur aftur til gomlu skipanina vi› lesití›, tí hvørki næmingar, lærarar ella prúvdómarar kunnu liva vi› n‡ggju prúvtøkuætlanini”.

Næmingarnir vísa á, at teirra fyrireikingartí› er alt ov stutt, og tí ber ikki til hjá teimum at koma væl fyrireika› til prúvtøkuna.

Í mótmælisskrivinum er ein innilig áheitan um at broyta avger›ina, tí orsaka av hesum vi›urskiftum ver›ur ta› trupult at fáa eitt hei›urligt úrslit, i› n‡tast kann til ví›ari lestur.

Tórbjørn Jakobsen fegnast annars um, at næmingar skipa fyri mótmælum, og heldur ta› vera positivt, at ungdómurin fer í kravgongu, tá okkurt í skipanini gongur teimum ímóti.

Hann væntar, at funni› ver›ur fram til eina loysn á málinum skjótt.



Tórbjørn Jakobsen, landsst‡risma›ur, vi› teimum 700 undirskriftunum, sum vór›u honum handa›ar av ónøgdum næmingum

Mynd: Jens Kr. Vang